# TILTØK

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíblugransking. Evni: Dániel kap. 9, koma Messiasar. Kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøti.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*Uppi á Brekku 3*
Morgungudstænasta kl. 11 v/ Debbi Joensen.
Sunnudagsskúli kl. 14 í Hoyvíkar skúla, onki møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti uppi á Brekku 3.

**Kirkju og missiónshúsið á Argjum**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Sólbjørg Símunarson.

**KFUM og KFUK í Havn**
Sunnudagin 5. mai: Eldrasamkoman og varðmenn fara útferð til Elduvíkar. Vit møtast í KFUK kl. 09.30 til kaffi. Tilmeldan neyðug áðrenn fríggjadagin 3. mai kl. 12 á tlf. 311928, 311824 ella 211824.

**Ebenezer**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta kvinnur. Kl. 19.30-22 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Jórun og Nurlan Malaikev. Gittit syngur.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Hósdagin kl. 20 verður Taizékvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Fríggjadagin kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Hámessa við Martin de Leur í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið 6. mai kl. 19.30 verður ein fyrilestur um »Lourdes« við Sr. Mariu. Øll eru vælkomin.

**Rhema á Hálsi**
Hóskvøldið kl. 19 møti við Frank Naea úr Nýsælandi. Hann er altjóða leiðari fyri missiónsfelagsskapin »Youth With á mission«.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP Kids (barnaklubbur)
Sunnumorgunin kl. 11 Familjumøti har børnini luttaka.
Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Símun Absalonsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 17 Familjumøti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti við Eiler Johannesen.
Mánadagin kl. 20 Bíbil- og Bønarmøti.
Telefonandaktin 424 741.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 19.30 byrjar ungdómslegan, tí verður einki opið hús leygarkvøldið 4. mai.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Egon Falk. Barnamøti kl. 17. Tú ert vælkomin í Kelduna.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 20.30 Opið hús v/ Jónfinn Olsen
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti v/ Jónfinn Olsen
Mánakvøldið kl. 20 Bíbliutími/Bøn.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti v/ Jákup R. Hansen, presti. Drekkamunnur verður aftaná.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Um viðrar verður útimøti kl. 16 við kirkjuna. Viðrar ikki, verður sang- og vitnimøti í Missónshúsinum kl. 16. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Magnus Jensen og Fredrik Joensen.
Mánakvøldið kl. 20 Heimaforbundið – fyri allar kvinnur.

**Kirkjan á Leiti**
Vikuskiftismøti verður fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin ongin sunnudagsskúli og onki møti vegna vikuskiftsimøti á Leiti.

**Blái Krossur Føroya**
Í sambandi við aðalfundin í Leirvíkar missiónshúsi um vikuskiftið, verður bíbliutími leygarmorgunin kl. 11 v/ Thomas Dam. Kl. 14 verður aðalfundur. Kl. 16 orðaskifti um staðbundna blákrossarbeiðið og kl. 20 Ungdómsmøti, ið BKU skipar fyri.
Sunnudagin verður familjumøti kl. 14.30, kl. 16.30 kunning um altjóða Bláa Kross og møti kl. 19, har Torleif Johannesen talar.

**Dagtilhaldið í Vági**
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00. Øll eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 29. apríl*
kl. 9.45-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Vit gera grýtulappar
kl. 14-18 Kort- og bobbspæl, telving, dart og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikudagin tlf. 316491
*Týsdagin 30. apríl*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Føroysk klæði. Søguligt yvirlit. Nicolina J. Beder
*Mikudagin 1. mai*
kl. 10-13 Matgerð
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur. Vit fara niðan á Kovalag at vitja Kirsten og Heina Olsen
*Hósdagin 2. mai*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 3. mai*
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

## GULLBRÚDLEYP

Hjúnini Marjun og Karl Martin Klein hava gullbrúdleyp í dag, 3. mai. Vælkomst verður frá kl. 16.00 í heiminum undir Hálsi 54 í Klaksvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Eysturoyar gongufelag**
Gongutúrur verður sunnudagin 5. mai. Gingið verður frá vestara tunnilsmunna (Norðskála) og um Lokkafellsdyrnar. Vit møtast við vestara tunnilsmunna kl. 14.00. Tilmelding á Kunningarstovunum í Eysturoynni tlf. 449449 ella 444860.

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
fer á áhugaverda bussferð til tann søguríka býin Ribe leygardagin tann 11. mai. Seinasta freist at boða frá luttøku er tann 6. mai hjá Oddvør á telefon 75155877 ella hjá Joan á tlf. 75152208.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærarabúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**MBF**
Íslandsvegur 10C
100 Tórshavn
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 · Fax 310813
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102 og t-post:
sigmo@post.olivant.fo
Demenslinjan – er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 – svarar týsdag kl. 18.00-20.00.


# MANNING TIL NORRÖNU



Hervið verður søkt eftir manning til summarsiglingina hjá Norrönu, ið byrjar 18. mei.

Størvini, ið sett verða, umfata allar deildir innan catering, so sum:

Pursarar, **kokkar, bakarar,** sleiparar, barrfólk, cafeteriafólk, tænarar, kioskgentur, fólk til reingerð og informatiónsgentur.

Viðkomandi skal verða røkin, fryntligur, kunna veita eina góða tænastu og duga at málbera seg á norðurlendskum- og enskum máli.

Góðkent heilsuprógv fyri sjófólk krevst.

Løn sambært sáttmála millum Reiðarafelagið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir, merktar "Manning", við cv, avriti av prógvum og møguligum ummælum verða at senda til:

**SMYRIL LINE**
**Postboks 370 • 110 Tórshavn**

Smyril Line hevur høvuðsskrivstovu í Tórshavn, deildir í Hanstholm, Bergen, Reykjavík og Lerwick. Síðan 1983 hevur MF Norröna, ið hevur pláss til 1.050 ferðafólk og 300 bilar, silgt millum Norðanlond. Vegna vaksandi talið av ferðafólkum byggir Smyril Line nýtt skip, sum verður sett í sigling á várið 2003. Nýggja Norröna verður 30.000 BRT og hevur pláss til 1.500 ferðafólk og 800 bilar. Smyril Line eigur harafturat Hotel Føroyar og Vallaraheimið Tórshavn. Eisini er Smyril Line høvuðspartaeigari í sluppini "Norðlýsið".

team85




## FILMSTEIGURIN

# We were Soldiers



Mel Gibson hevur høvuðsleiklutin sum oberstloytnanturin Harold Moore, og Madeleine Stowe leiklutin sum Julie Moor í filminum, We Were Soldiers, sum verður vístur í Havnar Bio í kvøld.

» – Vit eru á veg inn í Dal Deyðaskýggja, har tú skalt verja ryggin hjá manninum viðsíðina av tær, eins og hann skal verja tín rygg, og tað hevur einki at siga, hvussu vorðin hann er, ella hvussu hann kallar Gud. Vit skulu í kríggj móti einum øðiligum og málrættaðum fíggginda. Eg kann lova tykkum fyri, at eg skal fáa tykkum allar heimaftur á lívi. Men eg svørji… tá vit skulu í kríggj, skal eg vera tann fyrsti, sum seti fótin á vígvøllin, og eg skal verða tann síðsti, sum fer av honum aftur. Og eingin verður latin eftir… deyður ella livandi. Vit skulu allir heimaftur.«

Hesi orð vóru partur av taluni, sum harold Moore, oberstloytnantur helt fyri soldátum sínum, dagin fyri hann fór við teimum í kríggj í Vietnam. Framman fyri sær hevði hann ein hóp av ungum soldátum, óroyndar og roynda hermenn við arrum innan fyri uniformin og við medaljum uttaná. Tað var 1. Bataljon av 7. Kavalerínum… sama regiment, sum undir leiðsluni hjá George Armstrong Custers, generali, varð útruddað av sioux-indiánunum undir legandariska stríðnum við Little Big Horn í 1876.

Sunnudagin 14. november 1965 endaði regimentið í eini líknandi støðu, tá Hal Moore varð flogin saman við ungu hermonnu sínum og settir av í Zonu X-Ray í la Drang-dalinum, sum vietnamesarar nevna »Dalur Deyðans«. Hetta var meira ella minni mett sum ein rutinuferð, men Moore og teir 400 menn hansara komu skjótt eftir, at teir vóru kringsettir av eini 2.000 norðurvietnamesiskum hermonnum. Hetta slagið var eitt tað blóðugusta í søgu USA og var samstundis fyrsta rættuliga stóra slagið millum amerikumenn og norðurvietnamesarar…







**Frumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 03.05. | kl. $20^{00}$ | Fríggjadagin | 03.05. | kl. $23^{00}$ |
| Leygardagin | 04.05. | kl. $20^{00}$ | Leygardagin | 04.05. | kl. $23^{00}$ |
| Sunnudagin | 05.05. | kl. $19^{15}$ | Sunnudagin | 05.05. | kl. $22^{15}$ |

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

# HAVNAR BIO
**Tlf. 31 19 56**




Fríggjadagin 03.05. kl. $23^{30}$ Leygardagin 04.05. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 05.05. kl. $22^{45}$




Fríggjadagin 03.05. kl. $21^{15}$ Leygardagin 04.05. kl. $21^{15}$
Sunnudagin 05.05. kl. $20^{30}$




Fríggjadagin 03.05. kl. $18^{45}$ Leygardagin 04.05. kl. $18^{45}$
Sunnudagin 05.05. kl. $18^{00}$

**KOMANDI FILMUR**




**Heimsfrumsýning – Billettsølan er byrjað**

Hósdagin 16.05. kl. $01^{00}$ Hósdagin 16.05. kl. $19^{00}$
Hósdagin 16.05. kl. $22^{00}$